**UTTAN ÚR HEIMI**

## SARS á Taiwan

Ein 44 ára gamal granskari, sum arbeiðir á einari rannsóknarstovu á Taiwan, hevur fingið ta herviligu lungjasjúkuna SARS.

Hetta er tann fyrsti tilburðurin av sjúkuni í fleiri mánaðir, og heilsumyndugleikarnir eru serliga ansnir, tí tann sjúki granskarin var á einari ráðstevnu í Singapore fyrr í hesum mánaðinum. Spurningurin er so, um hann hevur fingið smittuna har ella undir arbeiðinum á rannsóknarstovuni. Fyribils verður hann hildin í einrúmi í tríggjar vikur, meðan sjúkueyðkennini verða kannað.

SARS tók seg upp í Kina fyri júst einum ári síðani, og teir næstu mánaðarnar kravdi sjúkan meiri enn 800 mannalív. Umleið 8.500 fólk í meiri enn 30 londum vórðu smittað, og sjúkan gjørdi mest um seg í Kina, Hongkong, Taiwan, Singapore og Kanada. Tann 5. juli kunngjørdi heimsheilsustovnurin WHO, at tann seinasti sjúklingurin var vorðin frískur. Men nú er sjúkan so staðfest aftur.

## Útróðrarmenn gevast

Støðan hjá norskum útróðrarmonnum er so trupul, at nógvir velja at selja sínar bátar ella at lata teir høggja upp.

Tað vísir seg, at meiri en helmingurin av útróðrarmonnunum, sum hava egnan bát, klára ikki at rinda rentur og avdráttir. Serliga har norðuri í landinum eru menn illa fyri, eftir at inntøkan fer minkað eina helvt. Høvuðsorsøkin er, at bátarnir sleppa bara at fiska ein tíggjundapart av tí toski, sum teir sluppu at fiska fyri fimtan árum síðani, sigur norska útvarpið. At prísurin so eisini hevur verið fallandi ger ikki støðuna betur, og tí eru nógvir útróðrarmenn komnir í fíggjarliga trongstøðu.

Ein fyribilskanning vísir, at fleiri hundrað útróðrarmenn, sum hava egnan bát, megna ikki at rinda bátin, men hildið verður, at talið í veruleikanum er nógv størri. Stjórnin í Oslo hevur samtykt at játta útróðrarmonnum 80 milliónir krónur í upphøggingarstuðuli.

## Skuldu myrða Saddam

Ísraelsk bløð vilja vera við, at ísraelsku myndugleikarnir høvdu lagt eina ætlan um at beina fyri Saddam Hussein, tá hann var og fylgdi verfaðirinum til gravar í 1992.

Morðið varð lagt til rættis, eftir at Irak sendi fleiri rakettir eftir ísraelskum málum undir Flógvakrígnum í 1991. Ætlanin var at beina fyri irakska forsetanum við einari serbygdari rakett, men tá fimm hermenn, sum skuldu fremja morðið, doyðu undir einari venjing, bleiv ætlanin slept. Táverandi forsætisráðharrin, Yitzak Rabin, gav heldur ongantíð loyvi til at fremja morðið, skrivar blaðið Maariv.

Sambært blaðnum doyðu teir fimm hermenninir í einari venjing í Negev-oyðimørkini í oktober í 1992. Hermenninir, sum spældu lívverjar hjá Saddam Hussein, doyðu, meðan lagnunnar speisemi vildi tað so, at maðurin, sum spældi Saddam Hussein, slapp livandi frá tilburðinum. Heryvirmaðurin, sum sendi rakettina avstað, fekk tríggjar mánaðar treytaða fongsulsrevsing. Hnn flutti seinni til USA, skrivar Maariv.

## Professari snýtti

Ein dómstólur í Geneve í Sveits hevur dømt ein svenskan professara fyri at hava sagt ósatt ella bert hálvar sannleikar um vandan við passivari royking, skrivar dagens Nyheter.

Professarin fekk stuðul frá amerikonsku tubbaksverksmiðjuni Philip Morris til sítt rannsóknararbeiði, men tað kom ongantíð fram, tá professarin almannakunngjørdi úrslitini av sínum kanningum. Men herfyri avdúkaðu tveir av starvsfeløguum hansara á lærda háskúlanum í Geneve sambandið við amerikonsku fyritøkuna. Nú er hann dømdur fyri at hava verið óreiðiligur í sínum arbeiði og fyri at hava komið umdøminum hjá lærda háskúlanum í vanda.

Sambært dagens Nyheter vildi professarin millaum annan vera við, at passiv royking er als ikki so vandamikil, sum vísindin sigur hana vera.

# 18 tons av próvtilfari ímóti Saddam

*Tað eru ikki allir irakar, sum eru líka fegnir um, at Saddam Hussein er tikin. Nógvir sunnimuslimar stuðla hann framvegis og lova blóðuga hevnd. Vesturlendskir eygleiðarar siga, at ansa amerikanararnir ikki eftir, kann tað enda við borgarakríggi*



**Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch hevur smuglað 18 tons av stjórnarskjølum og loyniligum skjølum úr Irak. Tey kunnu nú nýtast í einum rættarmáli ímóti gamla einaræðisharranum.**

RÆTTARSÓKN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sjølini eru ikki nýggj, men stava frá 1991. Í mars tað árið gjørdu kurdarnir har norðuri í Irak uppreistur. Tað eydnaðist teimum at hertaka nógvar almennar skrivstovur, og áðrenn irakski herurin rak teir aftur haðani, tóku kurdarnir øll almenn skjøl, sum teir komu framá.

Nakað seinni sendi Human Rights Watch tvey umboð til Norðurirak at leita eftir møguligum hópgravum, og tá gjørdu kurdarnir av at lata teimum tey nógvu skjølini, sum síðani vórðu latin amerikonsku herleiðsluni við Persaflógvan.

Í 1992 og 1993 vórðu tey 18 tonsini av skjølum flutt við skipi til USA, og síðani hava tey ligið á einari goymslu hjá Human Rights Watch í New York.

Kanningar seinni hava víst, at har eru skjøl hjá iraksku trygdartænastuni, fregnartænastuni og loyniligu løgregluni. Eisini eru nógv skjøl hjá norðuriraksku deildini hjá Baathflokkinum.

Sambært Human Rights Watch hevði hendan deildin ábyrgdina av álopinum á kurdarnar í áttatiárunum, tá stýrið hjá Saddam Hussein beindi fyri meiri enn 200.000 kurdum við eiturgassi.

Sambært mannarættindafelagsskapinum vóru teir iraksku embætismenninir sera nærlagdir, og næstan hvør smálutur varð festur á blað. Tað kann nú koma Saddam Hussein aftur um brekku, tá hann einaferð kemur fyri rættin, skrivar Reuters.

# Eru í hølunum á bin Laden

**Amerikanararnir eru í hølunum á Osama bin laden, sigur George W. Bush, forseti.**

LEITING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani Saddam Hussein varð tikin, hevur verið spurt, nær amerikanararnir fara at finna yviorgangsleiðaran Osama bin Laden.

Men tað verður ikki leingi. Sambært George W. Bush, forseta. Í samrøðu við sjónvarpið ABC gjáranáttina segði hann, at amerikanararnir eru í hølunum á bin Laden, og at hann verður funnin.

Amerikanska herleiðslan heldur, at bin Laden slapp til rýmingar undan ógvusliga bumbu- og rakettálopinum í Tora Bora har eysturi í Afghanistan fyri tveimum árum síðani. Hildið verður, at hann fjalir seg onkunstaðni við tað 2450 kilometrar langa markið millum Afghanistan og Pakistan, og hóast fleiri hundrað amerikanskir hermenn og fregnartænastumenn hava leitað har leingi, hava teir ikki funnið hann enn.

– Men vit eru í hølunum á honum, og hann verður funnin, sigur Bush.

**ítróttur**
Nr. 241 • hósdagur • 18. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Andrew fer av landinum

**Sáttmálin við Fremad Amager er upp á pláss, og í januar mánaði fer vandamikli framherjin til Danmark**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tvey ár á rað hevur Andrew av Fløtum verið toppskjútti hjá meistaraliðnum. Komandi ár verður tað tó danska Fremad Amager, sum fær gagn av máltevinum*

Síðani Andrew av Fløtum í heyst var nakrar vikur og vandi við Fremad Amager, hevur toppskjúttin hjá HB seinnu árini verið í bíðistøðu. Danska felagið segði rættiliga skjótt, at teir avgjørt vóru áhugaðir í føroyska álopsmanninum, og sjálvur segði Andrew rættiliga skjótt, at var tilboðið á eini leið, so fór hann avstað.

### Møguleiki at koma víðari

Nú er bíðitíðin tó av, og mikudagin kundi leikarin so sjálvur vátta, at avgerðin er tikin.

– Eg havi tikið avgerð um at royna meg í donskum fótbólti, og sum so var tilboðið frá Fremad Amager nøktandi, so jú. Eg ætli mær at royna.

Spurdur, um ein slíkur sáttmáli er nakað, sum hann verður ríkur av, sigur Andrew, at tað er tað avgjørt ikki.

– Tað er so einki, sum eg verið millióningur av. Men eg fái eina løn, sum eg kann liva av, so mær nýtist ikki at arbeiða við síðuna av.

Tað eru tað annars fleiri í Fremad Amager, sum gera. Bert heilt fáir leikarar í felagnum hava fulltíðarsáttmálar, og hetta kundi bent á, at venjarin í felagnum, Michele Guarini, hevur í kvittanunum at geva Andrew fastan sess í álopinum, men hesum vísur Andrew tó aftur.

– Eg havi so ikki fingið lovað nakað sum helst í so máta, men eg fari so sjálvandi at gera mítt besta.

Sjálvur hevur Andrew fyrr sagt, at talan ikki var um nakað ræðandi høgt støði í næstbestu donsku deildini. Nakað á leið sum toppurin av bestu føroysku deildini, og her heur Andrew í øllum førum staðið seg væl við hópum av málum á kontini. Spurdur, um ætlanin ikki eisini er, at málini skulu vera eins nógv í tali í Danmark, sigur hann, at tað kann bara tíðin vísa.

– Hatta var í øllum førum ein góður spurningur, men eg fái so ikki svarað. Tað vildi í øllum førum verið stuttligt, um tað hevði eydnast.

Tað er North Atlantic Football Agency við Jákup í Stórustovu, sum hevur staðið fyri samskiftinum í málinum, og Jákup ivast ikki í, at tað fyri Andrew kann vera gott at koma til Fremad Amager. Eitt felag, sum Jákup nú er um at kenna heilt væl, eftir at hann eisini var tann, sum stóð fyri skiftinum hjá Jann Inga Petersen til felagið fyrr í ár.

– Sjálvur haldi eg, at Fremad Amager er eitt felag, sum hóskar seg væl hjá føroyskum leikarum at koma til. Teir gera nógv fyri leikararnar, og støðið haldi eg eisini vera hóskandi hjá føroyskum leikarum, sum hava ambitiónir um at koma uttanlands. Standa teir seg væl har, so er eisini munandi lættari hjá teimum at koma víðari. Tú ert at kalla til próvtøku hvørja viku, og tað verður fylgt sera væl við, hvussu einstøku leikararnir standa seg.

### Eingin 100 ára dagur

Sostatt er nú greitt, at Andrew av Fløtum ikki verður partur av HB-liðnum, sum komandi árið skal halda 100 ára dagin. Júst hetta inniber kanska eisini, at talan verður um eitt av teimum heilt spennandi kappingarárunum hjá felagnum, og Andrew dylir ikki fyri, at hetta eisini var nakað, sum hann hugsaði nógv um.

– Tað var heilt avgjørt ein tung avgerð at taka, og einki er at ivast í, at eg fari at sakna bæði HB og Føroyar fyrstu longu løtuna. Men hinvegin, so ert tú noyddur at taka lopið onkratíð, um tú vilt sleppa víðari. Eg eri 24 ára gamal, og um eg skal hava møguleikan at royna meg sum yrkisleikari, so er als ikki víst, at eg fái nakran annan møguleika, so tað rádd um at taka av, sigur hann at enda.

Og líkt er so eisini til, at hetta sorgblídni er galdandi í HB, sum nú missir ein av grundstuðlunum á liðnum.

– Vit hava jú vita av hesum møguleikanum í eina tíð, so vit hava havt tað í tonkunum, sigur formaðurin í HB, Birgir Enghamar.

– Og tað er einki at ivast í, at Andrew er ein leikari, sum vit nú koma at mangla. Vit hava tó fleiri ungar og evnaríkar leikarar, sum stríðast fyri at sleppa framat, men fótbólturin er jú broyttur nógv seinnu árini, so vit mugu eisini hyggja at, hvørjar aðrar møguleikar vit hava. Nevndin er eisini longu farin ígongd við at leita eftir einum leikara, sum kann koma í hansara stað, men enn er fáa vit so ikki sagt nakað um, hvat spyrst burtur úr hesum. Tað er jú so stutt síðani, at avgerðin varð tikin, men vit ætla okkum í øllum førum framvegis at vera við í toppinum. Siga vit ikki tað, so lúgva vit, sigur Birgir Enghamar at enda.

## HM fyri smátjóðir

**Ein nýggj fótbóltssamgonga hevur sæð dagsins ljós**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Smáar fótbóltstjóðir kring heimin, sum ikki eru limir í FIFA, og tær, sum ikki hava møguleika til tess, eru nú av álvara farnar at virka fyri sínamillum kappingum.

Nýggja fótbóltssamgongan hevur fingið navnið, NF-Board, og millum limalondini teljast eitt nú Vestursahara, Monaco, Chagosoyggjarnar og Sámaland. Sámarnir fara annars í næstum undir sína fyrstu landsliðsuppgávu, og verður tað tá Norðurcypern, sum verður mótstøðuliðið.

Í alt er talan um 73 limalond, sum ætla sær saman í NF-Board, og tó at vónin er, at onkur av hesum við tíðini kunnu fáa FIFA-limaskap, so eru ætlanir longu frammi um eina HM-kapping fyri smátjóðirnar. Hvar og nær hendan verður, er tó enn ikki avgjørt.